

## Várligur Øssur Mohr í Listaglugganum

Várið setur sín ljósa dám á framsýningina hjá Øssuri Mohr, sum letur upp í Listaglugganum í dag. Gjøgnumgangandi myndevnið framsýningini er ljósið og litspælið í náttúruni. Hesuferð eru málningarnir heldur ljósari enn vanligt, og minna okkum á várið. 27 málningar eru við á framsýningini, og eru teir allarflestu málaðir hetta seinasta hálva árið. Tríggir av málingunum hava tó verið ávegis í eini tvey til trý ár, men nú var rætta løtan komin at sýna teir fram, sigur Øssur Mohr. Fernisering verður í dag klokkan 16 í Listaglugganum, N. Finsensgøta 25 í Havn. Framsýningin hongur uppi í tvær vikur.



*Sjónleikarhúsið verður karmur um eitt íslendskt valkvøld í Føroyum í annaðkvøld*

# Íslendska valið í Føroyum

**Í morgin, flaggdagin, skulu íslendingar til valborðið at velja nýggja stjórn. Alt bendir á, at sitandi samgonga vinnur valið, og her í Føroyum ætla íslendingar at fylgja væl við**

ÍSLENDSKT VAL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Leygardagin – í morgin – er okkara flaggdagur, og vit halda hann sum tað sømir seg. Men 25. apríl er eisini ein serligur dagur fyri íslend ingar, í hvussu er í ár, tí tá er valdagur hjá grannunum norðanfyri.

Vit føroyingar kenna væl til støðuna hjá íslendingum, og hvussu illa stendur til har. Føroyska sendikvinnan í Reykjavík, Gunvør Balle, greiddi mikukvøldið frá støðuni í Íslandi á einum fundi hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag, og hon nam sjálvandi við verandi politisku støðuna. Vinstrasamgongan, sum tók við eftir at Geir Haarde legði frá sær, stendur at vinna, og alt bendir á, at nýggja stjórnin fær arbeiðsfrið, tá valið er av.

Ein av stóru spurningunum upp undir valið er, hvørt Ísland skal leggja inn umsókn um upptøku í ES ella ikki. Tað tykist sum at flestu íslendingar vilja fegnir sleppa upp í europeiska felagsskapin, og einasta argumentatiónin, ið fyllir, er spurningurin um ræðisrættin yvir ríkidøminum í havinum. Hinvegin halda flestir íslendingar, at gjaldoyra er fokið, og einasti vegurin aftur á rætt er at taka evruna sum gjaldoyra. Hetta ber tó kortini ikki til, uttan at gerast fullgildur limur í ES.

Og í so máta tykist at vera seinasta útkall hjá Íslandi, tí verður ikki umsókn send inn nú, skulu íslendingar gloyma alt um ES komandi tíggju árini, tí felagsskapurin fer neyvan at taka nýggjar limir upp hesa tíðina.

### Fylgja við

Eisini íslendingar í Føroyum eru spentir upp á valið í Íslandi, og teir ætla at gera nógv burtur úr degnum.

Í hesum sambandi boðar íslendska sendistovan í Føroyum frá, at Sjónleikahúsið í Havn verður karmur um eitt føroyskt valkvøld, har tað ber til at fylgja við valinum í Íslandi. Byrjað verður klokkan 20 leygarkvøldið og hildið verður so fram út á kvøldið og kanska náttina, til úrslitið er kent.

Sambært Hagstovuni eru 187 íslendskir ríkisborgarar í Føroyum 1. januar 2009, og hugsast kann, at fleiri av hesum fara at møta upp í annaðkvøld, kanska serliga tí talan er um eitt leygarkvøld, og flest øll fólk hava frí dagin eftir.

Tí ber eisini til at sita nakað leingi út á náttina, um so skuldi verið.

Íslendska sendistovan verður sjálvandi við í tiltakinum í Sjónleikarhúsinum í annaðkvøld.

## Bjørn Kunoy leiðir samráðingarnar um landgrunsmarkið

**Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, hevur tilnevnt løgfrøðiliga ráðgeva sín, Bjørn Kunoy, at leiða samráðingarnar um ytri landgrunskrøvini norðan fyri Føroyar. Bjørn Kunoy verður somuleiðis formaður í nevndini.**

TÍÐINDASKRIV

Uttanríkisráðharrarnir Jørgen Niclasen og Per Stig Møller hava avrátt, at umboð fyri Uttanríkisráðið skal hava leiðsluna og formansskapin í samráðingarnevndini, ið skal leggja fram landgrunskrøvini norðan fyri Føroyar fyri landgrunsnevnd Sameindu Tjóða. Samráðingarnevndin við føroyskari leiðslu skal somuleiðis svara møguligum spurningum o.ø., ið landgrunsnevnd Sameindu Tjóða setur í sambandi við krøvini.

Hetta er fyrstu ferð, at kongsríki Danmarkar leggur eitt slíkt krav fyri ST, og tað er slóðbrótandi, at samráðingarnevndin hevur føroyskan formansskap og samráðingarleiðara.

Á árliga fundinum millum báðar uttanríkisráðharrarnar Jørgen Niclasen og Per Stig Møller í Gásadali í februar mánaði í ár vóru landgrunskrøvini norðan fyri Føroyar umrødd. Báðir ráðharrarnir hava síðan sínámillum viðgjørt, hvussu partarnar í felag skulu leggja fram ytri landgrunskrøvini norðan fyri Føroyar.

Málið hevur sera stóran týdning fyri Føroyar, og Jørgen Niclasen setti tí fram ynski um, at Føroyar fáa leiðsluna í serkønu føroysku og donsku samráðingarnevndini, ið skal leggja fram ytri landgrunskrøvini fyri landgrunsnevnd Sameindu Tjóða.

Bjørn Kunoy er 34 ára gamal og útbúgvin løgfrøðingur við Université Paris V René Descartes. Harumframt hevur hann eina Master í fólkarætti við Université Paris X Nanterre og eina LLM í evroparætti frá the European College í Brugge. Bjørn hevur áður arbeitt hjá Altjóða havrættardómstólinum í Hamburg og hjá Dómstólinum hjá Evropisku Felagsskapunum i Luksemburg.



*Bjørn Kunoy skal leiða samráðingarnar um ytri landgrunskrøvini norðan fyri Føroyar. Mynd Jensk Vang.*